# *Mannagongd:*

## Fráboðan, fyrireiking og góðkenning av umsóknum um granskingarstuðul

**Henda mannagongdin er galdandi fyri allar umsóknir um uttanhýsis fígging á yvir 50.000 kr. til granskingarverkætlanir, og sum eru undir leiðslu av starvsfólkum á Fróðskaparsetri Føroya.**

**Eru starvsfólk á Setrinum samstarvspartur á umsóknum til verkætlanir, sum eru undir leiðslu av øðrum stovnum, ella um søkt verður um minni enn 50.000 kr., skulu tey í samráð við viðkomandi deildargranskingarleiðara(r) royna at fylgja hesari mannagongdini so neyvt sum gjørligt.**

**Endamálið við hesi umsóknarmannagongdin er at stuðla granskarum í at skriva haldgóðar umsóknir, sum verða eftirmettar og javnlíkamettar. Harumframt skal mannagongdin tryggja, at Setrið/deildirnar eru kunnaðar um allar umsóknir um fígging: at kostnaðarmetingarnar eru rættar og at allar góðkenningar frá viðkomandi samstarvsfeløgum eru í lagi.**

**Allar umsóknir, har Setrið er við, skulu altíð hava greiða góðkenning frá viðkomandi dekani/-um ella deildargranskingarleiðara/-um, umframt frá viðkomandi pro-rektaranum áðrenn umsóknin verður latin inn.**

**Viðmælt verður ikki at lata umsóknir inn ov seint í mun til tíðarfreistirnar í mannagongdini.**

1. Øll uppskot um umsóknir skulu alt fyri eitt umrøðast á deildarstigi við deildargranskingarleiðaran (um neyðugt skal umsóknin eisini umrøðast við aðrar deildir um sannlíkt er, at tær fara at verða partur av verkætlanini). Verður hildið, at umsóknin er viðkomandi fyri deildina, og at tað er sannlíkt, at hon fær játtan, skal umsøkjarin formliga boða frá, at umsóknin er í umbúna. Tað skal gerast við at útfylla fyrra part av **oyðublaði 1 (sí viðheft skjal),** sum síðani skal sendast til viðkomandi deild og Granskingar- og framtakseindina.

2. Fullfíggjað uppskot um umsókn og holl kostnaðarmeting, sum Granskingar- og framtakseindin útvegar, skal síðani sendast til deildargranskingarleiðaran ***í seinasta lagi tríggjar vikur áðrenn umsóknarfreistina.***

3. Deildargranskingarleiðarin skipar fyri innanhýsis eftirmeting av umsóknini við í minsta lagi tveimum fólkum, sum arbeiða sjálvstøðugt hvør í sínum lagi. Endamálið er at gera eitt ummæli av umsóknini, umframt at umrøða førleikar og ivamál við umsóknaruppskotinum við aðrar deildir, har tað er viðkomandi.

4. Umsøkjarin endurskoðar umsóknina eftir tilmælunum frá ummælarunum og fullfíggjar seinna part av **oyðublaði 1** (viðheft) og lýsir har eftirmetingargongdina. Endurskoðaða umsóknin og útfylta oyðublaðið verður síðani sent til deildargranskingarleiðaran til viðgerðar og góðkenning.

5. Tá ið deildin hevur góðkent umsóknina, sendir deildargranskingarleiðarin umsóknina til Granskingar- og framtakseindina ***í seinasta lagi 1 viku áðrenn*** umsóknarfreistina. Granskingar- og framtakseindin kannar umsóknina og kemur við svari til umsøkjaran við avriti til deildargranskingarleiðaran. Umsøkjarin endurskoðar aftur umsóknina samsvarandi

viðmerkingunum og rættingunum og sendir umsóknina aftur til Granskingar- og framtakseindina til endaliga góðkenning.

6. Tá umsóknin er endaliga góðkend av Granskingar- og framtakseindini, verður lidna umsóknin send til uttanhýsis fíggingarstovnin, samstundis sum eitt avrit verður sent til Granskingar- og framtakseindina og deildargranskingarleiðaran.

7. Beinanvegin, at svar er komið upp á umsóknina, skal umsøkjarin kunna Granskingar- og framtakseindina, dekanin og deildargranskingarleiðaran um hetta (*uttan seinkingar*). Um umsóknin verður gingin á møti, skulu fíggjardeildin, rektarin og samskiftissamskiparin kunnast beinanvegin. Um umsóknin ikki verður gingin á møti, kann Granskingar- og framtakseindin skipa fyri einum fundi við umsøkjaran at umrøða aftursvarið frá uttanhýsis fíggingarstovninum og møguligar batar, ið kunnu gerast í umsóknini og saman gera eina nýggja fíggingarætlan.

**Standard frymil fyri fráboðan, fyrireiking og góðkenning av umsóknum um uttanhýsis fígging á Fróðskapsetri Føroya.**

<table>
<tr><td colspan="2">

**1. partur: Innleiðandi upplýsingar um umsókn, sum deildin hevur góðkent**

**(Hetta skal gerast liðugt, áðrenn farið verður í holt við endaligu umsóknina)**

English: Paediatric neurodisabilities in the Faroe Islands: epidemiology, sleep disorders and potential impact of a music intervention

Føroyskt: Neurologiskar sjúkur hjá børnum í Føroyum, farsóttarfrøði, svøvn ólag og møgulig ávirkan av eini tónleika uppílegging

</td></tr>
<tr><td>**Navn á høvuðsumsøkjara**</td><td>Tórunn Højgaard Ósá<br>Cand.scient.soc., Námslektari<br><br>Faculty of Health Sciences, University of the Faroe Islands<br><br>Tel.: +298 292250<br>Email: torunno@setur.fo</td></tr>
<tr><td>**Deild**</td><td>Faculty of Health Sciences, University of the Faroe Islands</td></tr>
<tr><td>**Navn á sam-umsøkjarum (innan- og uttanhýsis, íroknað tilknýttir stovnar/fyritøkur)**<br><br>**Names of co-applicants**</td><td>Main PhD supervisors:<br><br>Magni Mohr, Dean<br>Maria Skaalum Petersen, MSc, PhD<br>Marin Strøm, MSc, PhD<br>Co-supervisor:<br>Alfred Peter Born, Dr.med, PhD<br><br>Fróðskaparsetur Føroya<br>Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi<br>Vestara Bryggja 15, 4 Hædd<br>FO- 100 Tórshavn<br>Tel.:+298 352250<br>Email: magnim@setur.fo<br><br>Landssjúkrahúsið</td></tr>
</table>

| | |
|---|---|
| **Dagfesting fyri góðkenning frá deildini** | Date: feb. 2020<br><br>Discussed with (Dean or FRL): |
| **Granskingargrunnur og útboð**<br><br>**(við leinki)** | |
| **Sannlík samlað upphædd, ið søkt verður um** | |
| **Verkætlanarheiti** | |
| **Innlatingarfreist hjá granskingargrunninum** | |
| **Innanhýsis freist fyri innlating til góðkenning frá Granskingar- og framtakseindini (1 vika áðrenn innlatingarfreistina)** | |

| |
|---|
| **2. partur: Innanhýsis metingartilgongdin**<br>**(Hetta skal gerast liðugt eftir metingina)** |

| | |
|---|---|
| **Høvuðsviðmerkingar frá 1. ummælara og afturboðan/framdar broytingar** | Ummælari:<br><br>Viðmerkingar:<br><br>Afturboðan og broytingar |
| **Høvuðsviðmerkingar frá ummælara 2 og afturboðan/framdar broytingar** | Ummælari:<br><br>Viðmerkingar:<br><br>Afturboðan og broytingar: |
| **Aðrar viðmerkingar** | |
| **Váttan frá høvuðsumsøkjara** | **Undirskrivað:**<br><br>**Navn og heiti:**<br><br>**Dagfesting:** |

| 3. partur: Góðkenning | |
|---|---|
| **Deildarstig** | Hendan umsóknin er ummæld og eftirmett á deildarstigi og hevur deildin góðkent umsóknina.<br><br>**Undirskrivað:** |

| | |
|---|---|
| | **Navn og heiti:**<br><br>**Dagfesting:** |
| **Universitetsstig/Granskingar- og framtakseindin (REU)** | Hendan umsóknin er ummæld og eftirmett á deildarstigi og hevur deildin og Granskingar- og framtakseindin góðkent umsóknina.<br><br>**Undirskrivað:**<br><br>**Navn og heiti:**<br><br>**Dagfesting:** |